Tórshavnar Alfrøði:

# Konfirmantar í Havn í 1925




Konfirmantar í Havn 25. oktober 1925: Aftara rað f.v.: ókendur, Poul Ludvig Guttesen (Havn), Andreas William Restorff (Havn), Håkon Djurhuus (Havn), ókendur, ókendur, Leivur Lützen (Havn), ókendur, ókendur, Joen Pauli Frederik Dahl (Havn), ókendur, Johan Ziska (Havn), ókendur og ókendur.

Miðraðið f.v.: ókend, ókend, Else Elisabeth Jensen (Havn), Andrea Olivia Jacobine Elvira Djurhuus (Havn), Ása Haraldsen (Havn), ókend, Jenny Petrine Berg (Havn), ókend, Jens Christian Rubert Dahl (Havn), ókendur, ókendur, og Odmar Skarðhamar (Havn).

Fremsta rað f.v.: Elinborg Samuelsen (Havn), ókend, ókend, ókend, ókend, ókend, Johanne Kamban (Havn), Ingeborg Danielsen (Havn), Kathrine Gunhild Skarðhamar (Havn), ókend, og ókendur.

Teir konfirmantarnir, sum ikki eru navngivnir eru: Johanne Mortensen (Havn), Marin Jacobsen (Havn), Borghild Vang (Kaldbak), Louise Mortine Ragna Vang (Kaldbak), Elise Marine Frida Abrahamsen (Havn), Sigrid Anna Christina Reinert (Kaldbak), Ellen Jacobine Johanne Hofgaard (Havn), Elsebeth Arge (Argir), Anna Kathrine Hansen (Havn), Jenny Cathrine Susanne Mikkelsen (Havn), Herdis Hansine Frederikke Nybo (Hvítanes), Ragna Frederikke Hansen (Havn), Elisabeth Malene Olsen (Havn), Marsanna Niclasen (Havn), Peter Johannes Jacob Emil Sofus Joensen (Havn), Tønnes Theodor Mikkelsen /Havn), Poul Karter Niclasen (Havn), Napoleon Jensen (Havn), Andreas Reinert (Kaldbak), Arthur Henning Jacobsen (Havn), Peter Pauli Skeel Nolsøe (Kaldbak), Axel Poulsen (Havn), Zacharias Poulsen (Havn), Verland Johansen (Havn), Joen Pauli Sofus Ferdinand Dam (Argir), Peter Mortensen (Argir), Joen Mortensen (Havn), Stig Heinesen (Havn), Hjarlgrim Frits Guttesen (Havn), Daniel Arge (Argir), Joen Ernst Joensen Rubeksen (Havn), Hans Andreas Frederik Nielsen (Havn), Sigurd Frederik Hansen (Havn), Hans Edvard Joensen (Argir) og Jørgen Evald Torkild Mørkøre (Havn).

Á myndini eru 37 avmyndaði og 51 blivu konfirmeraði, t.v.s. at 14 konfirmantar mangla á myndini. Vit fara at heita á fólk um at hjálpa til, so vit kunnu fáa restina av nøvnunum uppá pláss. Vinarliga ring til Birgar Johannessen á tlf. 314647 ella 214647.

## Sóknast eftir mynd frá 1932

Er tað nakar sum liggur inni við myndini av konfirmantunum 20. mars 1932?

Konfirmantarnir vóru: Mikkjal Àrnason Helmsdal, Gunnar Isholm, Ejler Dahl Michelsen, Ole Julian Hansen, Hans Jacob Juel Johannes Ferdinan Poulsen, Stig Gregersen Rasmussen, Nancy Poula Hildegard Hansen, Maren Susanne Mortensen, Caroline Marie Fosaa, Birthe Søberg Christensen, Annie Àrnadóttir Helmsdal, Signhild Herborg Mikkelsen, Vilborg Karen Vilhelmsen, Rigmor Eline Tórsheim, Rigmor Sofie Helene Restorff & Rachel Sevilde Olsen øll úr Havn. Kjartan Hjalgrim Hentze (Hestur), Arne Olaf Svenning Olsen (Argir), Jacob Christian Reinert (Kaldbak), Anna Helene Kitty Simonsen (Hoyvík), Astrid Mortensen (Argir), Lena Marie Holm (Nólsoy), Astrid Joensen (Nólsoy) og Rachel Oline Holm (Argir).

Vinarliga ring til Birgar Johannessen á tlf. 314647 ella 214647 um nakar hevur, ella veit um onkran sum hevur mynd av hesari konfirmatiónini.

## Nýggj altartalva til Æðuvíkar

Komandi sunnudag – sum er 1. sunnudagur í advent – tekur missiónshúsið í Æðuvík nýggja altartalvu í nýtslu. Tá gudstænastur verða hildnar í bygdini er missiónshúsið karmur um hesar.

Talan er um ein altarkross, sum skiftandi myndir kunnu setast inn í, alt eftir kirkjuári, árstíðum og liturgiskum litum.

Tað er Birgit Jacobsen á Nesi sum eigur hugskotið til hesa altartalvuna, og sum Arni Højgaard á Toftum hevur smíðað og lagt úr hondum.

Hinvegin so eru tað barnagarðsbørn í Æðuvík sum hava litað og prýtt altartalvuna við hóskandi myndum. Alt hetta er gjørt undir kønari leiðslu og íblástri frá leiðara teirra, Káru Løkin.

Høvið verður at síggja og uppliva hesa nýggju altartalvuna við gudstænastuna í Æðuvík komandi sunnukvøld kl. 18.

**Litmyndir av brúðarpørum í Vikuskiftis Sosialurin**

Sum nakað nýtt seta vit nú allar myndir av brúðarpørum, sum vera sendar til til teigin "Heilsanir", í Vikuskiftis Sosialin í **litum**.

Brúðarmyndirnar koma undir somu treytir sum aðrar myndir til "Heilsan-ir", t.v.s. at tær kosta 30 kr.

***Síðsta freist at lata brúðarmyndirnar inn er hósdag kl. 12.00***

**Sosialurin**